# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# SAMT LØGTING OG SAMT DANMARK

Tað var áhugavert at síggja í vikuni sum fór, at eitt samt løgting stóð saman um uppskotið frá limunum í uttanlandsnevndini til samtyktar um at heita á landsstýrið um at taka upp samráðingar við donsku stjórnina. Uppskotið snúði seg eisini um at styrka altjóða virkisføri Føroya og at beina burtur ótíðætlaðar og óhepnar forðingar á uttanríkispolitiska økinum.

Tað hendir nú ikki so ofta, at løgtingið stendur saman um so eitt so álvarsamt mál - ikki minst tá talan er um mál av ríkisrættarligum slag. Men hetta gevur so landsstýrinum eitt gott mandat mótvegis donsku stjórnini.

Tá grønlendska sjálvsstýrislógin fyri tveimum árum síðani var til ummælis í Føroyum vísti løgmaður á tær óhóskandi uttanríkispolitisku avmarkingarnar. Onkur vil tí spyrja, um uttanríkispolitiska heimildarlógin yvirhøvur átti at verið samtykt, tá hon longu er vorðin ov trong. Men her ber til at vísa á søguliga tilgongdina, sum alla tíðina hevur verið - eisini við heimastýrislógini, at vit hava víðkað karmarnar so hvørt, sum ynski hevur verið um tað.

Um vikuskiftið var forkvinnan í danska Javnaðarflokkinum, Helle Thorning-Schmidt á vitjan í Føroyum, og helt hon røðu á landsstevnun hjá bróðraflokkinum í Havn leygardagin. Fríggjakvøldið varð hon spurd í sjónvarpinum, hvørja støðu hon hevur í ríkisrættarliga spurninginum – og hon svaraði eins elegant sum allir forsætisráðharrar higartil hava svarað, at føroyingar sjálvir gera av, hvat vit vilja í ríkisrættarligum høpi, og at Danmark fer at virða tað. Hon segði, at hon sær ríkisfelagsskapin sum okkara felagsskap, og at henni dámar væl mentanarligu bondini millum londini, at henni dámar væl familjubondini, sum eru millum londini, men at ábyrgdin at nágreina, hvussu bondini skulu verða, er føroysk: Altso, at føroyingar sjálvir skulu gera av, hvørja støðu vit hava til ríkisfelagsskapin og til Danmark. Spurd hvat hon heldur um ta semjuna, sum gjørd er í stjórnarskipanarnevndini segði hon, at hon hevði stóra respekt fyri ynskinum hjá Føroyum í hesum arbeiði, men at vit í ríkisfelagsskapinum skulu hava »reinar linjur«.



Danmark tosar við einari tungu, tá talan er um ríkisrættarligu støðuna. So er tað líka mikið, um forsætisráðharrin er konserativur, vinstramaður ella ein javnaðarkona. Valla hevði nakar roknað við øðrum. Tá nú løgtingið somuleiðis tosar við einari tungu, so kann tað bara verða áhugavert at síggja, hvat fæst burturúr.

**» Føroyingar avgera sjálvir støðuna til Danmark**

# Anna í MTV veitslu

Føroyska songkvinna Anna Nygaard var í farnu viku millum teirra, sum vórðu boðin í fimm ára føðingardag hjá MTV Danmark. Kendir danskir tónleikarar – teirra millum Rasmus Seebach, Bryan Rice, Alphabeat og mong onnur – vóru til veitsluna, sum varð hildin í Pakhus 11.

Og tey vórðu øll avmyndað á reyða løparanum, sum tað sømir seg einari veitslu við kendum fólkum.

Anna Nygaard, um júst hevur givið nýggjan sang út, er eftir sína luttøku í X Factor blivin so kend millum danir, at hon eisini verður boðin til veitslu fyri kendar tónleikarar.

Í næstu viku kemur Ann Nygaard til Føroya at hava sínar fyrstu konsertir eftir luttøkuna í X Factor.

*eydun@sosialurin.fo*



Mynd: MSN Starlounge



**» Miðøkið er jú friðað...**

SÓLVIT SIMONSEN
KJAK Á SÍÐU 12



**» Trúskapur móti sær sjálvari**

FRÍÐÁLVUR JENSEN
KJAK Á SÍÐU 12

# Eitur nú Javnaðarflokkurin

Føroya Javnaðarflokkur hevur skift navn til Javnaðarflokkurin., og javnstøða skal vera á uppstillingarlistum.

Leygardagin hevði flokkurin eykalandsstevnu. Umfrat vitjanina hjá Helle Thorning-Schmidt var eittans punkt á skránni, lógarbroytingar.

Høvuðsbroytingarnar í lógunum eru, at Føroya Javnaðarflokkurin hevur skift navn til bert at eita Javnaðarflokkurin, og at flokkurin skal hava standandi valevnislistar, og at á endaliga valevnislistanum skal tað vera javnstøða ímillum kynini.

# Øskan forðar 1.000 fráferðum í Evropa

Øskan frá Eyjafjallajøkli órógvar ikki bara flogferðsluna til og úr Føroyum í dag. Evropeiski flogferðslumyndugleikin Eurocontrol sigur, at umleið 1.000 fráferðir verða avlýstar í Evropa í dag orsakað av øskuni.

Tann størsta floghavnin í Evropa, Heathrow uttan fyri London, var stongd í nátt, og hin floghavnin har, Gatwick, var eisini stongd til klokkan átta í morgun. Tað elvdi til nógvar seinkingar víða um.

Í Niðurlondum, Írlandi, Norðurírlandi, Skotlandi og Wales eru fleiri floghavnir framvegis stongdar, tí ov nógv øska er í luftini.

Niðurlendsku myndugleikarnir siga, at Schiphol-floghasvnin í Amsterdam letur ikki upp fyrr enn í fyrsta lagi klokkan eitt seinnapartin, og soleiðis er eisini við floghavnini í Rotterdam.

*arni@sosialurin.fo*

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*